# BARA KOMA



## 2020

Tað er ilt at spáa um framtíðina, men tá Rói roynir at gera seg sínar metingar av henni, so er tað eitt ið hann er sera upptikin av.

– Eg vóni, at Viðareiði framvegis fer at vera ein bygd í vøkstri. Eg vóni sjálvandi eisini, at okkurt vinnuligt arbeiðspláss verður skapt her, soleiðis at Viðareiði ikki bara verður ein sovibýur.

– Vit síggja eisini, at fólkatalið er í støðugum vøkstri. Og eg vóni tí, at enn fleiri fara at vilja búseta seg her.

» Eg vóni, at okkurt vinnuligt arbeiðspláss verður skapt her, soleiðis at Viðareiði ikki bara verður ein sovibýur

**VEKSUR**

*Viðareiði veksur í fólkatali, men eingin ivi er um, at bygdin hevði vaksið enn meiri, um ein tryggari farleið var higar. - Ein tunnil má koma nú, sigur bygdarráðslimurin Rói Absalonsen*

Haraftrat eru fáir pensjónistar á Viðareiði, samstundis sum barnatalið er so stórt og at skúlin er ov lítil. Samstundis sær ein, at flestar aðrar bygdir og býir kring landið minka í fólkatali.

Nógvar orsøkir eru uttan iva til hetta, men tá ein hugsar um at ein stórur partur av mannfólkunum eru knýtt at sjónum, so er ikki ónatúrligt at skattainntøkan er bundin at hesi gongd.

– Vit uppliva tíbetur í dag, at tað gongur framá við fiskivinnuni, sigur Rói, og vísir til seinastu inntøkutølini sum vísa, at í januar mánaði hækkaði skatturin við meiri enn góðum trimum prosentum.

– Hetta sær bara gott út. Vit eru í øllum førum nøgd.

*snorri@sosialurin.fo*

## Nógv inn – men nógv út aftur

Nýggjastu hagtølini frá Hagstovuni vísa ein hækkaðan skatt á Viðareiði higartil í ár í mun til í fjør - so mong sum 20,3 prosent.

Hóast ein sær peningin koma inn í kommunukassan, so kann ein samstundis staðfesta, at nógvur peningur fer úr aftur kassanum til dagliga raksturin og fastar skyldur hjá kommununi.

– Tað er faktiskt meiri enn eg trúði, vísir Rói Absalonsen á, og peikar samstundis á eitt ynski hjá mongum viðingum at fáa eitt sambýli til eldri í bygdini.

– Eg haldi at tað er púra skeivt, at vit skulu senda okkara gomlu av bygdini. Tey skuldu sjálvandi verðið her, – her sum tey altíð hava búð.

– Men eg vænti tó, at soleiðis sum støðan er í dag, verður nakað enn, áðrenn vit fáa eitt sambýli..